## Ein múrur afturat

Ísraelski forsætisráðharrin, Benjamin Netanyahu, hevur góðkent, at Ísrael skal byggjua ein múr fram við markinum við Egyptaland. Endamálið er at forða ólógligum innflytarum, sum serliga koma úr afrikonskum londum, og hernaðarligum bólkum at koma inn um markið. Forsætisráðharrin sigur við fjølmiðlarnar, at endamálið er eisini at tryggja og at varðveita Ísrael sum eitt jødiskt og demokratiskt samfelag. Mett verður, at tað fer at kosta umleið 1,4 milliard krónur at byggja múrin fram við egyptiska markinum, og at arbeiðið fer at taka tvey ár.



## Jemen vil samráðast

Júst sum USA og Bretland hava gjørt av at hjálpa stjórnini í Jemen í bardaganum við yvirgangsmenn, ætlar jemenska stjórnin at samráðast við al-Qaeda. Jemenski forsetin, Ali Abdullah Saleh, sigur sambært tíðindastovunum, at hann er sinnaður at samráðast við yvirgangsmenninar, um teir ganga við til at leggja vápnini. Amerikanararnir siga, at fleiri limir í al-Qaeda fjala seg í fjøllunum í Jemen. Millum annað er talan um egyptar og saudiarabar, sum fáa venjing í Jemen, áðrenn teir fara til Afghanistan at hjálpa teimum víðgongdu kreftunum har.

# Vil banna ungum at keypa sær sólviðgerð



*Í vár, ella í seinasta lagi beint eftir summarfrítíðina, ætlar Aksel V. Johannesen at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera tað ólógligt hjá ungum undir 18 ár at keypa sær sólviðgerð*

**Landsstýrismaðurin í heilsumálum ætlar nú at gera tað forboðið hjá ungum undir 18 ár at sóla sær í solarium**

FYRIBYRGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fer tað skjótt at verða forboðið hjá ungum undir 18 ár at fara í solarium at sóla sær.

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, sigur, at hann nú er farin í holt við at orða eitt uppskot, sum eftir ætlan verður lagt fyri Løgtingið í vár ella beint eftir summarfrítíðina.

Uppskotið fer at gera tað forboðið hjá ungum undir 18 ár at fara í solarium at sóla sær.

Landsstýrismaðurin sigur, at hetta er eitt mál, sum eisini skal hava eina politiska viðgerð í samgonguni.

Men stendur tað til hann sjálvan, verður uppskotið lagt fram.

Og tað skuldi kanska verið løgið vissi restin av samgonguni, ella Løgtinginum annars, ikki taka undir við uppskotinum, tí hetta er eitt av tilmælinum í víðfevndu krabbameinsætlanini, sum ein serfrøðingabólkur handaði landsstýrinum í heyst.

Krabbameinsbólkurin mælir til, at eitt tað fyrsta tiltakið, sum gjørt verður fyri at fyribyrgja krabbameini, er at gera tað ólógligt hjá ungum undir 18 ár at keypa sær sólviðgerð.

Og mælt verður samstundis til, at hetta forboðið verður sett í verk longu í ár.

### Kannar praktiskar spurningar

Aksel V. Johannesen staðfestir, at skal tað forbjóðast ungum at keypa sær sólviðgerð, er tað eitt mál, sum kann føra til nakrar praktiskar trupulleikar, sum skulu loysast.

Ein av hesum spurningum er, hvussu lógin skal umsitast og, hvussu vit skulu tryggja okkum, at hon verður hildin.

- Veruleikin er, at nógvar sólmiðstøðir eru ómannaðar, tí har fara fólk bara inn, koyra pening í eina automat og leggja seg undir sólina.

- Spurningurin er, hvussu vit skulu tryggja okkum, at lógin verður hildin, tí tað er helst eisini ein stórur spurningur um tað ber til hjá løgregluni at ferðast runt á sólmiðstøðir at halda vakt og at forða fyri at lógin verður brotin.

Landsstýrismaðurin sigur, at í løtuni eru tey í ferð við at kanna, hvussu tey hava gjørt í øðrum londum, har tað longu er bannað ungum undir 18 ár keypa sær sólviðgerðir.

Men ber tað ikki bara til at áleggja teimum, sum selja sólviðgerðir, at syrgja fyri, at aldursmarkið verður hildið?

- Tað kunnu vit siga, men so fer tað helst at taka grundarlagið undir teimum smáu sólmiðstøðunum, tí tey fara neyvan at hava umstøður til at hava fólk at passa sólina fyri at tryggja, at aldursmarkið verður hildið.

- Men hesin spurningurin um, hvussu lógin skal hondhevjast, verður nú umhugsaður, sigur Aksel V. Johannesen.

## Sólviðgerð er sami ágangur á fólkaheilsuna sum royking

**Tað besta hevði verið at tað var heilt forboðið at keypa sær sólviðgerðir, siga bæði Landslæknin og formaðurin í Fyribyrgingarráðnum**

FYRIBYRGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Solarium er ágangur ímóti fólkaheilsuna, akkurát sum tubbakk er tað.

Tað sigur okkara fremsti heilsufakligi myndugleiki, Høgni Debes Joensen, landslækni og Pál Weihe, leiðari á deildini fyri Arbeiðs- og almannaheilsu og formaður í Fyribyrgingarráðnum.

Teir mæla til, at tað verður forboðið at ung, sum eru undir 18 ár og sum sostatt ikki eru myndug, sleppa at keypa sær sólviðgerð.

Men teir dylgja ikki fyri, at tað besta hevði verið, at tað var ólógligt at keypa sólviðgerðir yvirhøvur.

Samstundis hevur bólkurin, sum handaði landsstýrinum eina krabbameinsætlan í fjør, mælt til at gera tað ólógligt hjá ómyndigum at keypa sær sól.

Sostatt má staðfestast, at ætlanin hjá landsstýrismanninum at gera tað forboðið hjá ungum at keypa sær sól, sum vit greiða frá í hinari greinini, fult í samsvari við tey heilsufakligu tilmælini.

Teir báðir siga at vit hava leingi vitað, at samband er ímillum húðkrabba og sólarljós, serliga tann serliga vandamikla móðurmerkjakrabban.

- Tað er greitt samband ímillum títtleikan av móðurmerkjakrabba og hvussu nógvari sól, húðin hevur verið fyri, serliga hjá fólki, sum hava ljósa húð ella eru reyðhærd.

Landslæknin og formaðurin í Fyribyrgarráðnum vísa á, at títtleikin av húðkrabba er munandi øktur síðstu árini frá 16 tilburðum í 1995 til 52 tilburðir í 2005. Eisini títtleikin tí tí vandamikla húðkrabbanum er nógv øktur, frá einum ella tveimum tilburðum um árið í 1995 til 10 tilburðir í 2004 og 15 tilburðir í 2005.

Teir ivast ikki í, at ein orsøki til hetta eru teir batnandi møguleikarnir at ferðast suður heitari lond og møguleikin at keypa sær sólviðgerðir.

Tí eiga vit at minka um árini, sum ultraviolett ljós frá sólini hevur á okkum og her eru sólmiðstøðirnar ein ógvuliga ítøkilig kelda, leggja teir afturat.